# Toskur á Føroyabanka minkar í støðd

FISKIRANNSÓKNIR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Væl er at fáa av toski á Føroyabanka, men støddin er minkandi. Hetta vísa seinastu kanningarnar, sum Magnus Heinasson hevur gjørt á leiðini. Niðanfyri prenta vit høvuðsútslitini av royndarveiðuni.

Dagarnar 14. til 18. september gjørdu fólk frá Fróðskaparsetrinum og Fiskirannsóknarstovuni kanningar við Magnusi Heinasyni á Føroyabanka. Úrslitini vístu, at meira var fingið av toski hendan túrin enn í fjør, men at toskurin nú er minni. Eins og undanfarin ár er hýsan í støðugum vøkstri. Hetta er eisini galdandi fyri upsan, men upsin er minni nú enn fyrr. Miðallongdin á upsanum hendan túrin var 56 cm. Hetta er væl minni enn undanfarin ár. Í september 1998 var miðallongdin á upsa 65 cm, í 1999 var hon 67 cm. Miðalhitin við botnin á Føroyabanka hendan túrin var 10.52 °C. Hetta er á leið tað sama sum andanfarin ár.

Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa eitt mát fyri nøgdina og biologiina hjá teimum týdningarmestu fiskasløgunum, ið finnast á Føroyabanka. Eisini vórðu tey havfrøðiligu viðurskiftini á Bankanum kannaði. Umframt hetta var túrurin skipaður sum ein undirvísingartúrur hjá biologi næmingum á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

Magnus Heinason nýtti eitt 16 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum og við vanligum grunni. Breidlarnir vóru 60 m og 120 m, Steinhamns lemmar, Minilog temperatur- og dýpdarmátari, Sea-Bird CTD og WP-2 glúpur.

Farið varð av Havnini 13. september kl. 21.00. Fyrsta CTD-støðin varð tikin á Føroyabanka 14. september kl. 04.56. Seinasta støðin varð tikin 18. september kl. 18.05. Tríggjar støðir vóru ikki tiknar (1722, 1729 og 1839) av tí at tíðin gekk undan. Í sýnishondbókini verður miðað eftir at taka 400 nytrur av toski, hýsu og upsa. Hetta var tó ikki møguligt fyri upsan, av tí at ov lítið var at fáa.

Fingin vórðu íalt 32 ymisk fiskasløg, sum tilsamans vigaðu 35.198 kg (talva 1).

Tilsamans vóru fingin 5.283 kg av toski á Føroyabanka hendan túrin Toskur var fingin á 21 av teimum 26 støðunum. Mest var fingið í punti 1716 (724 kg). Annars var veiðan javnt býtt yvir tað mesta av Bankanum, har botndýpið var minni enn 200 m.. Miðallongdin var 78 cm. Hetta er nakað minni enn undanfarin ár, tá miðallongdin hevur verið umleið 90 cm. At miðallongdin er minkað kemst av, at meira var til av smærri toski (< 70 cm) enn undanfarnu árini, tá so at siga bert stórur toskur, størri enn 80 cm, hevur verið at fingið á Bankanum.. Hendan túrin var miðalveiðan 203 kg pr. fiskitíma. Hetta er meira enn undanfarna ár, tá veiðan var 83 kg pr. fiskitíma.

Í alt vórðu fingin 18.006 kg av hýsu (talva 1). Hýsan var at fáa yvir tað mesta av Bankanum Størsta tovið var fingið í punti 1715 (2.474 kg). Miðallongdin av hýsuni var 38 cm. Miðalveiðan av hýsu hendan túrin var 693 kg pr. fiskitíma, móti 436 kg undafarna ár.

Samlaða veiðan av upsa var 5.944 kg. Størst tovið var fingið í punti 1813 (2.602 kg). Miðallongdin á upsanum var 56 cm . Hetta er væl minni enn undanfarin ár. Í september 1998 var miðallongdin á upsa fingin í yvirlitstrolingini á Føroyabanka 65 cm, í 1999 var miðallongdin 67 cm.. Miðalveiðan hendan túrin var 229 kg pr. tov. Hetta er væl meira enn fyri einum ári síðani, tá veiðan einans var 83 kg pr. tov.

Sera lítið var fingið av brosmu, einans 12 kg á 3 støðum. Lálla var bert fingin á 3 støðum vestanfyri. Seinastu árini hevur kalvin verið í minking. Hendan túrin vóru bert fingin 11 kg av kalva á 6 støðum. Av sandsprøku vóru bert fingin 6 kg tilsamans á 4 støðum. Sandsprøkan manglaði á sand- og skeljabotninum mitt á Bankanum. Ein hummari var fingin á tí norðastu støðini á Bankanum. Tað hendir av og á, at einstakir hummarar verða fingnir á hesi støðini. Hesir hummarar stava helst frá hummaralarvum, sum eru riknar av Skeivabanka, har hummari jú finst. Er hetta soleiðis, er hetta tekin um, at eitt rák viðhvørt er tvørtur um Bankarennuna. Ein fagurserkur varð fingin. Hesin fiskurin er ikki so vanligur um okkara leiðir, mens finst longur suðuri. Tvey kg av bláriddara vórðu fingnir. Hetta er eins og á øðrum túrum. Svartkjaftur, havmús, gulllaksur, blálonga og glaskvoysa vórðu bert fingin á støðunum vestanfyri.

| Fiskaslag | Samlað veiða (kg) | Tal av prøvum: Longdamátað | Stak vektir | Nytrur | Magar |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 18006 | 4862 | 2709 | 442 | 57 |
| UPSI | 5944 | 728 | 596 | 311 | 74 |
| TOSKUR | 5283 | 774 | 659 | 398 | 51 |
| SVARTKJAFTUR | 2074 | 832 | 205 | | |
| HAVMÚS | 1220 | 76 | 76 | | |
| GULLLAKSUR | 875 | 198 | 142 | | |
| MATHØGGUSLOKKUR | 584 | 94 | 63 | | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 398 | 115 | 46 | | |
| KNURRHANI | 172 | 90 | 67 | | |
| GLÝSUFISKUR | 166 | 114 | 71 | | |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 112 | 143 | 139 | | |
| LONGA | 84 | 28 | 28 | | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 41 | 21 | 8 | | |
| TUNGA | 39 | 30 | 27 | | |
| LÁLLA | 24 | 50 | 50 | | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 22 | 15 | 15 | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 19 | 15 | 15 | | |
| KALVI | 11 | 9 | 9 | | |
| HAVTASKA | 17 | 4 | 4 | | |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 16 | 24 | 24 | | |
| BLÁLONGA | 16 | 11 | 11 | | |
| SKØTA | 14 | 1 | 1 | | |
| BROSMA | 12 | 6 | 6 | | |
| GLASKVOYSA | 12 | 6 | 6 | | |
| FAGURSERKUR | 11 | 1 | 1 | | |
| SANDSPRØKA | 6 | 8 | 8 | | |
| SILVURMURTUR | 4 | 17 | 12 | | |
| LíTLA BROSMA | 3 | 2 | 2 | | |
| HUMMARI | 3 | 1 | 1 | | |
| BLÁRIDDARI | 2 | 9 | 9 | | |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 2 | 3 | 3 | | |
| NEBBASILD | 0.02 | 7 | 0 | | |
| TILSAMANS | 35198 | 8294 | 5013 | 1151 | 182 |

*Talva 1: Samlaða veiðan og tal av mátingum/prøvum frá Føroyabankatúrinum 14.-18. september 2001.*



*Magnus Heinason*
*Savnsmynd*



# Nógvur fiskur sunnan fyri Flesjarnar



*Tað er høgligur útróður, tá ið 3.500 pund kunnu fáast á 24 stampum – ella 3.000 pund á 12 stampum sunnanfyri Flesjarnar*

**Ein bátur fekk 3.500 pund á 24 stampum, og ein annar 3.000 pund á 12 stampum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Ja, løgið kann tað vera. Um tað er ringt tekin – ella gott, er ilt at siga.

Men satt er tað, at útróðrarbátar herfyri fingu nógvan fisk á eini so høgligari leið, sum millum Flesjarnar, Hvítanes, Hólman og Eystnes.

### Góðar setur

Tað ljóðar, sum ein dreymur, men hann er sannur.

Í eina tíð hava útróðrarbátar fingið nógvan fisk sunnanfyri Flesjarnar,

suður ímóti Hólmanum og nakað suður í dýpið, sum er millum Stong og Eystnes.

Tann eini toftabáturin hevði ikki færri enn 3.500 pund á 24 stampum; ein annar hevði herfyri 3.000 pund á bara 12 stampum!

Fleiri aðrar góðar setur eru eisini gjørdar á hesi leið í seinastuni.

Hetta er ikki vanligt, og hvat hetta merkir, skulu gudarnir vita.

### Ringt tekin

Onkur vil ivaleyst siga, at hetta er vánaligt tekin, at fiskurin er svangur og fær einki at eta úti á. Hvussu er ov ikki, er ikki gott at vita, men teir, sum hava roynt á hesi høgligu leið, siga, at fiskurin er væl fyri. Hann er ikki rak, men slagið er ikki nakað serligt í mun til tað, sum fæst úti á.

Menn plaga at siga, at tað er ikki gott tekin, tá ið fiskurin soleiðis søkir inn undir land. Hetta sást eisini undan fiskaloysinum fyrst í nítiárunum, siga teir.

Munurin hesaferð er tó tann, at fiskurin, sum nevnt, er í góðum standi, meðan hann í sínari tíð var rak.

### Ikki so óvanligt

Tað er nú heldur ikki so óvanligt, at fiskur er at fáa sunnanfyri Flesjarnar. Har ber saktans til at fáa nakrar hýsur og nakrar hampiligar toskar. Soleiðis hevur tað altíð verið. Men nøgdirnar seinastu tíðina á fleiri setum hava verið størri, enn undirritaði hevur hoyrt um áður.

Lat okkum so bara vóna, at nógvur fiskur hevur verið á hesi høgligu leið, tí so nógvur fiskur er til.

Stór løta á Fiskavirking í Miðvági:

# Seks fólk verða heiðrað

**– Hetta eru burtur av rutinerað fólk, sum verða heiðrað fyir 25 og 30 ára starvsdag, og teimum hevur tú altíð brúk fyri, sigur stjórin á Fiskavirking í Miðvági, sum nýtir høvi at takka hesum fólkum fyri drúgvu starvstíðina og trúgvu tænastuna**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

**Miðvágur:** Í samrøðu við Meinhard Jacobsen, stjóra í Føroya Fiskavirking, spurdu vit meira av tilvild, hvussu fólk støðast í fiskaframleiðsluni í dag, nú arbeiði á virkjunum kring landið hevur verið rættiliga støðugt. Hann letur rímiliga væl at, men heldur, at tað er ikki fyrr enn arbeiði er minni støðugt, at tú fært røttu myndina av, hvussu fólk støðast.

Tað er tó ikki so sjáldan, tú hoyrir tey yngru siga, at flakavirki er einki verandi stað fyri tey. Og tað man eisini vísa seg, at tað meira eru tey ungu, sum koma og fara. Nøkur steðga í fiskaframleiðsluni, áðrenn tey søkja sær útbúgving ella finna sær okkurt annað, ið tey halda vera betri og meira áhugavert. Men tað eru so sanniliga eisini tey, sum støðast og gerast “gomul” á flakavirkjunum kring landið, bæði tá ið tað gekk væl, og tá ið tað gekk minni væl.

### Seks 30 og 25 ára starvsdagar

Fríggjadagin kl. 15.00 skipar Fiskavirking í Miðvági fyri hugnaløtu í samband við, at seks fólk á virkinum hava verið til arbeiðis har í samfull 25 og 30 ár, trý í 25 ár og trý í 30 ár!

Albert Ellefsen, stjóri á virkinum, sigur, at tey hefta seg ikki so nógv við sjálvan starvsdagin hjá hvørjum einstøkum, men plaga at skipa fyri slíkum løtum fyri jól, og soleiðis er eisini hesaferð.

Tey trý, sum hava 30 ára starvsdag, eru Helgi Hansen (63), Miðvágur. Hann er maskinmeistari á virknum, Andreas Johannesen (68), Miðvágur. Hann hevur áður verið flakaformaður, men tekur sær serliga av pakningi og øðrum fyrifallandi. Síðan er tað Jona Samuelsen (64), Sandavágur. Hon fæst mest við at pakka, men í løtuni “fóðrar” hon bandfrystaran á virkinum. Øll hesi hava nú starvast á flakavirkinum í Miðvági í 30 ár.

Tey, sum hava verið í starvi í 25 ár, eru brøðurnir, Kári (44) og Egin (41) á Presttrøðni, báðir miðvingar; tann fyrri hevur verið arbeiðsformaður seinastu 5 árini, meðan hin arbeiðir í slógnum. At enda er tað Nicolina Haraldsen (45), Miðvágur. Hon arbeiðir í góðskueftirlitinum á virkinum.

### Gávu og blómur

- Vit gera ikki tað heilt nógva burtur úr hesum, men fara at hava ein longri kaffisteðgkl. 15.00. Løtan verður í kantinuni á flakavirkinum. Vit fara at handa hesum fólkum, sum so trúliga hava verið til arbeiðis á virkinum øll hesi mongu árini, eina gávu og blómur. Og tey, sum hava 30 ára starvsdag, fáa eisini okkurt minnismerki.

Albert vísir á, at eini 10-15 fólk á virkinum hava verið millum 20 og 25 ár í starvi og miðvingurin, Ólavur Hansen, hevur arbeitt á virkinum í 29 ár! Umframt hesi, hava eini 2-3 onnur fólk verið til arbeiðis í meira enn 25 ár.

So, sigast kann ikki annað enn, at nógv fólk hava støðast ómetaliga væl á flakavirkinum í Miðvági.

Spurdur, hvussu tað ávirkar arbeiðsgongdina, at so mong fólk hava verið so leingi til arbeiðis á virkinum, sigur Albert Ellefsen, at hetta er í hvussu er ikki negativt, tvørtur ímóti.

– Hetta eru burtur av rutineraði fólk, og teimum hevur tú altíð brúk fyri, sigur stjórin, sum nýtir høvi at takka fyri drúgvu starvstíðina og trúgvu tænastuna.

Fiskavirking í Miðvági er eitt gott arbeiðspláss; her er gott at vera, men taðskerst ikki burtur, at her er strævið viðhvørt, sigur stjórin at enda.


